# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JAKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Tónleikurin er betri, og sum heild eru størri krøv og fleiri kenslur í framførslunum í estetiska fimleikinum*

*Eyð Strøm, venjari hjá Havnar Fimleikafelag*

# Dómsnevndin varð vrakað

**Taktiska medvitið hjá FSF-nevndini tóktist vera sett høgt, tá nýggju kærunevndirnar skuldu veljast á aðalfundinum**



FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum avleiðing av nærum víðagitna Páll M. Joensen málinum eru reglurnar fyri spæliloyvi í vaksnamannadeildini viðgjørdar á fleiri av formansfundunum, sum hava verið. Nýggju kappingarreglurnar hjá FSF innihalda eisini greiðar reglur fyri skráseting av spælarum og spæliloyvi hjá hesum, og tað er ivaleyst ein avleiðing, sum bæði FSF og feløgini fegnast um.

### Dómsnevndin vrakað

Hinvegin varð tosað minni um eina aðra avleiðing, sum varð staðfest á aðalfundinum.

Nýggja skipanin í FSF-reglunum bar við sær, at Aganevnd og Yvirkærunevnd skuldu veljast.

Í Aganevndini, sum avloysir kærupartin av Kappingarnevndini, er ikki loyvi hjá limunum at hava aðrar nevndarsessir í FSF, og tí var greitt, at nýtt blóð nú kemur at viðgera kærur innan føroyskan fótbólt.

Fyri at skapa kontinuitet innan nevndararbeiðið, er framferðin í slíkum førum aloftast, at í øllum førum ein – og kanska tveir – av fyrrverandi nevndarlimunum halda fram í nýggjari nevnd. Og í hesum serstaka førinum vildi tað helst verið upplagt, um ein fyrrverandi dómsnevndarlimur varð settur í Aganevndina, meðan ein annar fekk sess í Yvirkærunevndini.

### Nevndartaktikkur

Men so var ikki. Og eittsindur beistaktiga kann helst sigast, nevndin hálvgum lirkaði fyrrverandi dómsnevndarlimirnar útum.

Í øllum førum vórðu kortini hildin nær kroppinum, áðrenn løtan kom, tá nevndin setti fram síni uppskot til limir í Aga- og Yvirkærunevndini. Við varalimum fevndi listin her um 10 nøvn, men ikki eitt tað einasta av hesum hevði uppruna í gomlu Dómsnevndini. Og høvdu feløgini ikki fyrireikað seg til hesa støðuna, so var tað nú ov seint hjá teimum, sum kundu ynskt veruleikan øðrvísi – at koma við nýggjum uppskotum. Í øllum førum vildi talan tá verið um bæði hálvar og heilar panikk-loysnir, og tað vildu feløgini helst heldur ikki hava.

Og so mundi tað eisini vera eitt fiks taktisk manøvra, at Jens Erik Magnussen varð settur í uppskot. Við valinum av honum í tí heilt tungu Yvirkærunevndina syrgdi FSF nevnliga fyri, at kontinuiteturin hóast alt er til staðar. Tá alt kemur til alt, so er neyvan nakar innan føroyska fótbóltsheimkin, sum er betri vitandi um føroyskar fótbóltslógir enn júst Jens Erik, og tí er tann so týdningarmikli reyði tráðurin framvegis til staðar hóast stóru útskiftingina.

### Ongar advokatskrivstovur

Nakað annað, sum eisini tykist eyðkenna nevndarvalið, er, at eingin av privatu advokatskrivstovunum er at síggja millum nevndarlimirnar. Hetta við undantaki av Sigmundi Poulsen, sum er varalimur í Yvirkærunevndini.

Tað var nevnliga eitt gruggandi element av teimum stóru, at skotini undir kæruviðgerðini í fjør í fleiri førum vórðu vend móti advokatskrivstovunum. Tí hóast FSF vónandi hevur neyðuga álitið á teimum sakførarum, sum felagsskapurin gjøgnum tíðirnar hevur valt í ymsu nevndarsessirnar, so er altíð óheppið, um illgitingar um ógegni fara fram. Tann vandin skuldi í øllum førum verið minni, nú talan í øllum førum er um løgfrøðingar, sum ikki hava egna praksis sum sakførarar.

## Byrjaðu við tøgn

Føroyskur fótbóltur hevur í ár sagt farvæl við tveir av teimum, sum gjøgnum árini hava givið sítt stóra íkast til bæði FSF og til fótbóltin annars.

Tí byrjaði aðalfundurin leygardagin eisini við eini løtu við tøgn, har Christian Olsen og Tórálvur Stenberg vórðu mintir.

Christian Olsen gjørdist í 1979 fyrsti formaðurin í FSF, tá fótbóltsdeildin innan ÍSF varð skipað sum sersamband.

Tórálvur Stenberg var í drúgt áramál formaður í AB. Og hann stendur enn sum ímyndin av framgongdini hjá felagnum, sum síðani 1999 hevur lyft seg úr táverandi 4. deild upp í Formula-deildina, har felagið nú fyri fyrstu ferð skal royna seg.

**-mørk**

## Áskoðararnir svíkja

Størsta einstaka orsøkin til roknskaparhallið hjá FSF á hálva millión tykist vera fallandi áskoðarainntøkur. Hóast hesar ivaleyst verða væl hægri í 2007, tá trý av teimum átta bestu londunum í heiminum koma á vitjan, so sýna søguligu tølini ein lítið hugaligan tendens. Ein tendens, sum rakti bonin í fjør við bara 772 tkr. í áskoðarainntøkum. Vónin er tó sjálvandi, at hetta talið betrast, men á fundinum var breið semja um, at hetta kravdi betri áskoðaraumstøður og – ikki minst – betri úrslit.

# Koppið kappingini

**Hóast hann ikki longur er partur av starvsnevndini hjá FSF, so hevði Jens Erik Magnussen eini seinastu ráð til aðalfundin og nevndina**

Fótbóltur
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Eg ætli mær als ikki at standa her í evstu løtu og siga, hvussu føroyskur fótbóltur skal skipa seg frameftir. Tað ivist eg ikki í, at onnur eru fult so væl før fyri. Men skal eg koma við einum góðum ráðum, so er hetta, at kappingin verður koppað á.

Soleiðis segði Jens Erik Magnussen, tá hann fyri seinastu ferð tók orðið á aðalfundi hjá FSF.

– Tað er eitt stig, sum tosað hevur verið um í eina tíð, og eg haldi, at mín fatan nú er avgjørd. Eg dugi at síggja nógvar og stórar fyrimunir við einum slíkum stigi, so mín seinasta áheitan til aðalfundin skal verða, at hesin møguleikin nú fær eina gjølla viðgerð, staðfesti Jens Erik.




*Nógv er fingið á skafti tey 29 árini, sum Jens Erik hevur sitið í FSF-nevndini. Sjálvur hevði hann tó eina seinastu áheitan til aðalfundin og nevndina*